Zacharias Hammer fær virðisløn:

MyndatÛlið er mÌn besti bl˝antur

M·nadagin varð sjÛnvarpsmaðurin Zacharias Hammer heiðraður fyri serligt mentanaravrik. Hetta var fyri at hava givið hyggjarum innlit Ì gerandisdag f¯royinga við sÌnum sjÛnvarpssendingum

VIRÐISLØN
Stefan í Skorini

– Eg eri ógvuliga fegin um, at mítt arbeiðið sum sjónvarpsmaður verður virt sum mentan. Tað er ógvuliga fløvandi, at fáa slíka virðisløn, segði Zacharias Hammer, sum annars segði seg hava torført við at seta orð á kenslurnar við eitt slíkt høvi.

– Myndatólið hevur altíð verið mín besti blýantur, segði Zacharias í takkarrøðuni.

Nevndin segði í grundgevingini fyri at hava givið honum virðislønina, at Zacharias hevur við sjónvarpssendingum sínum givið hyggjarum innlit í fjølbroytta livihátt føroyinga.

Grundgevingin

»Zacharias hevur við sjónvarpssendingum sínum givið hyggjaranum innlit í fjølbroytta livihátt føroyinga.

Við upptøkutóli sýnir hann dirvi, tá hann saman við bakkamonnum søkir bjørgini, fer við seyði í illgongdar skorar ella greiðir frá gerandisdegnum umborð á skipi.

Við gløggum eyga fyri upptøkulistini, evnar hann at rúnabinda fólk. Hann tvinnar nátúrmyndir og veruleika, so tú gerst partur av hesum mangan vandamikla arbeiði.«

Í nevdini fyri Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens eru fimm limir. Teir eru Egon Hansen, Jákup Jacobsen og Erling Isholm, valdir av býráðnum. Gunnar Hoydal er valdur av Rithøvundafelagnum og Turið Sigurðardóttir er vald av Fróðskaparsetrinum.

Við frá byrjan

Zacharias Hammer hevur verið við í Sjónvarpi Føroya heilt frá byrjanini. Fyrst í 1979 við Sjónvarpsfelagnum og síðani í almenna sjónvarpinum, sum varð sett á stovn í 1984.

Hann hevur seinastu árini verið í farloyvi, har hann hevur siglt úti við ymsum skipum, og hóast hann hevur verið sjómaður, so hevur hann eisini gjørt sendingar frá sínum túrum. Nú arbeiðir hann aftur í sjónvarpinum, og tað er hansara lívsstarv, sigur hann sjálvur.

– Eg var heppin at vera við frá byrjan í sjónvarpinum, og eg eri takksamur fyri møguleikan, eg havi fingið, at vísa føroyingum tann stórsligna urtagarð, sum vit eiga her, segði Zacharias í røðuni.

Hann legði tó afturat, at einsamallur hevði hann ikki fingið nógv av skafti, og hann vildi fegin luta heiðurin við teimum, hann hevði arbeitt við í sjónvarpinum hesi mongu árini.

At enda segði kendi verturin, at sjónvarpið er sum ein knívur. Hann kann vera nýttur til gott og ilt. Tí hava fjølmiðlafólk eina stóra ábyrgd at bera reint og satt tilfar.

Zacharias Hammer fekk virðisløn M.A. Jacobsens fyri serligt mentanaravrik. Hann fekk virðisløn fyri at hava givið hyggjarum innlit í fjølbroytta livihátt føroyinga
Mynd: Jens Kristian Vang

Barnasendingar

Zacharias Hammer hevur seinastu árini lagt seg eftir at gera náttúrusendingar, har hann fer við til bjarga og onnur støð, har eingin sjónvarpsmaður fyrr hevur hættað sær at farið.

Tað er fyrst og fremst hesar sendingar, sum hann hevur fingið virðisløn fyri.

Hann stóð eisini fyri barnasendingunum í sjónvarpinum í fleiri ár. Hvør minnist ikki Gyðu og Grana, fjørutrøllið í Fugloy, dølgarnir frammi við Gjónna og hinar jólaløturnar, tá smábørnini sótu sum límað til skermin.

Tey flestu í sjónleikarhúsinum vóru á einum máli um, at tað var rætt at lata Zachariasi virðislønina, sum er 20.000 krónur. Rigmor Restorff fekk hesa virðislønina í fjør.

Maud Heinesen um virðislønina:

Gevur mÊr mÛt at halda fram

Maud Heinesen hevur fingið barnabÛkaheiðursl¯n b˝r·ðsins fyri at barnaskaldskap hennara. Maud sigur, at hon Ì sÌnum barnabÛkum roynir at skriva um n˙tÌðar viðurskifti

VIRÐISLØN
Stefan í Skorini

Maud Heinesen fekk mánadagin Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs.

Maud hevur millum annað skrivað barnabøkurnar “Marjun og tey” og “Abbi og eg”. Harumframt hevur hon skrivað hópin av stuttsøgum í barnablaðnum, Mín jólabók og Glugganum.

Maud segði, at orsøkin til at hon fór undir at skriva var, at so fáar barnabøkur, sum snúðu seg um nútíðina, vóru á føroyskum. Børn tímdu ikki bara at lesa um tað farna, og tí valdi hon at fara undir bókaútgávur.

– Hetta gevur mær mót og skyldu at halda fram við at skriva, segði Maud Heinesen í røðuni. Hon legði afturat, at tað er gott at fáa eitt herðaklapp sum hetta á vegnum.

Bogi og Annfinnur burturstaddir

Tveir av teimum virðisløntu vóru ikki til staðar á samkomuni í Sjónleikarhúsinum. Teir vóru Annfinnur í Skála og Bogi Hansen.

Annfinnur í Skála fekk virðisløn fyri fagrar bókmentir. Tað var fyri bøkurnar um Heimin Forna, “Hjá dvørgum í Niðafjøllum” og “Ferðin til Zambora”.

Maud Heinesen fekk virðisløn fyri barnaskaldskap, sum stundum nemur við viðkvom evni
Mynd: Jens Kr. Vang

Nevndin metti, at hesar bøkurnar hava brotið upp úr nýggjum í føroyskum bókmentum. Bøkurnar eru um tvey ung, sum fara ígjøgnum tíðarlið inn í ævintýraheim, og tær sameina hegnisliga gamla søgn við nútíðar frásøgu.

Annfinnur er í Bretlandi og arbeiðir við eini nýggjari orðabók, og tí var hann ikki hjástaddur, men Jonhard Mikkelsen las røðu hansara upp.

Annfinnur helt skemtiliga fyri, at hansara bøkur vóru tær einastu skaldsøgurnar, sum vóru komnar út í farna árið, og tað mátti vera orsøkin til, at hann hevði fingið virðislønina.

Tað var í 1958, at býráðið valdi at lata mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens. Tá var Sigfried Skaale borgarstjóri, og Annfinnur er sonur hansara.

Bogi Hansen fekk virðisløn fyri yrkisbókmentir. Bogi er í Grønlandi og skipar fyri einum skeiði, og tí barst honum frá at vera við.

Grundgevingin var, at Bogi í bókini “Havið” á høgum vísindaligum stigi savnar alla sína vitan um lív og náttúru í heimshøvum og á heimaleiðum. Hetta verður gjørt á ein hátt, at hetta stóra á torgreidda evnið eisini hjá vanligum fólki verður skilligt í øllum sínum mongu lutum og .

Allar virðislønirnar eru á 20.000 krónur.

Japanarar fingið eyguni upp fyri Vestmanna

Nógv fólk var til staðar, tá forkunnugu gestirnir úr Japan vitjaðu vestmenningar í farnu viku.

Õ sÌðstu viku vitjaði ein sendinevnd ˙r Japan Ì F¯royum. Endam·lið var at hyggja eftir f¯royskum viðurskiftum

VITJAN
Heri á Rógvi

Millum ár og dag hava japanarar nakrar ferðir víst áhuga fyri Føroyum. Seinasta tekni um áhuga vístu japanarar í farnu viku, tá ein sendinenvnd vitjaði í Føroyum.

Sendinevndin taldi 12, allir menn. Hetta vóru allir eldri menn, sum umboða størri fyritøkur, sum allar arbeiða við havnagerðum burturav. Tílíkar sendinevndir hava eisini vitjað í øðrum londum, har hugt verður eftir ymiskum viðurskiftum. Í Føroyum vitjaði sendinevndin í Vestmanna og í Fuglafirði.

Henda sendinevndin hevur verið og vitjað í hinum Norðanlondunum. Ein av luttakarunum á túrinum hevði sett sær fyri at vitja Føroyar, tá hann einaferð fyri nógvum árum síðani kom í samband við ein føroying.

Fyrispurningurin um at sleppa at vitja í Føroyum kom til Føroya umvegis Føroysku Viðskiftastovuna í Keypmannahavn og japansku ambasaduna í Keypmannahavn.

Tað var eftir egnum ynski, at sendinevndin valdi at fara til Vestmanna á vitjan.

Umstøðurnar

Sendinevndin, sum vitjaði í Føroyum í farnu viku, umboðaði fyri tað nógva japanskar havnir. Hetta skal skiljast soleiðis, at umboðini, ið vitjaðu fyri kortum, burturav fáast við havnagerð og viðlíkahald av havnum eins og øðrum virksemi í hesum sambandi. Onkur av teimum vitjandi hevði eisini stóran áhuga fyri alivinnuni, sum verður rikin munandi øðrvísi yviri í Japan.

Tað var heldur ikki tann stóri steðgurin, ið japanararnir vóru í Vestmanna, men teir fingu tó høvi at síggja eitt sindur av hvørjum.

Endamálið hjá teimum útsendu var fyrst og fremst at hyggja nærri at umstøðunum í Føroyum. Sum áður nevnt, so hevur sendinevndin vitjað í hinum Norðanlondunum, har teir eisini hava skoðað, hvussu verður gjørt við hetta og hatta.

Tá sendinevndin vitjaði í Vestmanna nýttu teir høvi at hyggja nærri at havnaumstøðunum í Vestmanna. Eisini varð vitjað á Fiskavirking eins og alibrúkini vórðu hugd at.

Tað var eftir egnum ynski, at japanararnir valdu at leggja leiðina til Føroya, og eftir hvat Sosialurin skilir, so vóru teir eisini væl nøgdir við túrin.

Tá vit royndu at fregnast, um hvørja ávirkan hetta fær á framtíðina hjá bæði Japan og Føroyum, so er heldur trupult at fáa eitt greitt svar. Víst verður á, at hesin túrurin var umbiðin av japanarunum sjálvum, og teir fyrst og fremst vildu kunnað seg um føroysk viðurskifti. Ì øllum higartil eru ongar framtíðarætlanir settar út í kortið millum japanararnar og vestmenningar.

Dámdu spik

Tá sovorðið fólk kemur á vitjan, so verður oftani nógvur og góður matur borðreiddur fyri teimum, og í so máta var henda vitjanin einki undantak.

Skipað varð m.a. fyri einum betri bita fyri gestunum og teimum, sum vóru komin at taka ímóti.

Borðreitt varð fyri sushi gjørt burturúr føroyskum fiski. Eisini fingið gestirnir høvi at smakka grind og spik. Sosialurin veit at siga, at spikið varð etið sum var tað bomm. Kanska hetta fer at taka gestirnar úr Ásia aftur til Føroya.

Japanararnir vístu stóran áhuga fyri Føroyum. Eisini dámdi teimum væl føroyskan mat

SkÛtahj·lpin fyri 17. ferð

Leygardagin 22. september byrjar Skótahjálpin 2001. Hetta er 17. ferð, at skótar kring alt landið fara at gera sítt fyri at stuðla teimum, ið hava tørv á stuðli. FH-skótarnir, Føroya Skótasamband, Føroya KFUK-skótar og KFUM-skótarnir í Føroyum eru saman um Skótahjálpina.

Í ár stuðlar Skótahjálpin »Føroyska ljóðbókaútgávu« og »Girl Hostel« í Liberia. Harumframt fer 1/3 av Skótahjálpini í grunn, sum er tøkur til tess at veita bráfeingis stuðul ymsa staðni í heiminum.

Tað ber til at læna ávísar ljóðbøkur í bókasøvnunum ella keypa tær í bókahandli.

At fyrireika ljóðbókaútgávuna verður gjørt ókeypis, men ljóðbókanevndin hevur tó søkt um og fingið útgávustuðul frá stovnum og grunnum, ið vanliga veita stuðul til tílík endamál.

Tann útlendska verkætlanin stuðlar eitt barnaheim fyri gentur í Liberia, »Girls Hostel«. Tað er Frelsunarherurin í Liberia, sum rekur barnaheimið við stuðli frá Frelsunarherinum í Noregi. Tey, sum skipa fyri barnaheiminum, miða eftir at fáa eitt rúmligari barnaheim, sum er nærri skúlanum, har genturnar ganga.

Skótar fara at ganga hús úr húsi og bjóða seg fram at hjálpa við ymiskum. Ætlanin er, at fólk skulu lata eina ávísa samsýning afturfyri. Samsýningin fer óskerd at stuðla áður nevndu verkætlanum.

Skótahjálpin vísir á, at tað hevur týdning at stuðla, og at hvør sær kann gera mun. Eisini vil Skótahjálpin fegin takka fyri stuðulin, sum var givin í fjør.

-hr

Amerada Hess fingið loyvi

Heilsufrøðiliga starvsstovan boðar í tíðindaskrivi frá, at Amerada Hess hevur fingið loyvi til nýtslu og burturbeining av evnum og tilfari í sambandi við boring í føroyskum øki. Eftir ætlan byrjar Amerada Hess at bora fyrsta dagin, og nú eru at kalla øll loyvini fingið í rætt lag.

Ì loyvinum verða eisini settar treytir fyri, hvørji evni kunnu nýtast í sambandi við boringina.